## Portsmouth tapti og læt mál ígjøgnum

Óvæntaða oddalið í Premier League áðrenn hesa rundina var Portsmouth. Teir høvdu í vitjan av Bolton í gjárkvøldið, og hetta skuldi vísa seg at gerast ein torfør uppgáva hjá oddaliðnum. Portsmouth, sum ikki hevði latið eitt mál farið ígjøgnum, tapti 1-0. Hervið fingu teir sítt fyrsta tap í ár, og harafturat fór tað fyrsta málið ígjøgnum. Einasta málið í dystinum gjørdi Bolton miðvallarin, Kevin Nolan.

## Fótbóltsleikari má amputera beinið

Landsliðsleikarin frá Uruguay, Dario Silva, er noyddur at amputera beinið. Sunnumorgunin rendi hann útav í høvuðsstaðnum í heimlandinum, Montevideo, og læknarnir meta, at teir vera noyddir at amputera niðasta partin av høgra beinið hjá Silva. Verri er, at Dario Silva liggur enn uttan vit, og læknarnir eru bangnir fyri, at leikarin hevur fingið álvarsligan skaða í høvdið.



# Spennandi kapping í nýggju høllini í Kollafirði

**Kollfirðingar høvdu vitjan av donskum felag, og í hesum sambandi høvdu teir eina kapping millum fýra lið. Hetta var harafturat fyrsta ferðin yvirhøvur, at hondbóltskapping varð leikt í høllini í Kollafirði.**



*Kyndil vann fyrstu kapping, sum varð spæld í nýggju høllini í Kollafirði leygardagin. Teir vunnu allar sínar dystir*
*Mynd: Tróndur Olsen*

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Leygardagin varð nýggja høllin í Kollafirði karmur um stóra hondbóltskapping, tá kollfirðingar høvdu vitjan av øðrum liði hjá danska felagnum AaB. Hini liðini í kappingini vóru meistararnir úr Kyndli og silvurvinnararnir úr VÍF.

Føroysku liðini kenna sjálvandi nógv til hvørt annað, tí hetta eru jú somu lið, sum ár undan ári spæla hvørt ímóti øðrum. Danska liðið vistu føroysku liðini hinvegin ikki nakað um. Tað einasta, sum kollfirðingar høvdu fingið at vita, var, at liðið er talentlið hjá besta liðnum hjá AaB, sum í løtuni hevur fult stigatal í bestu donsku deildini. Harafturat høvdu teir fingið at vita, at leikararnir kláraðu at gera tekniskar detaljur í einum sera høgum tempo.

### Ingi fekk fyrsta málið

Kappingin var løgd soleiðis til rættis, at hvør dystur vardi 2 ferðir 20 minuttir, og liðini skuldu spæla ein dyst hvør ímóti øðrum. Í fyrsta dystinum leiktu kollfirðingar ímóti VÍF, og her vann VÍF við fimm málum. Tað mest áhugaverda var allarhelst, hvør mundi fara at fáa fyrsta málið, og sigast má, at tað bleiv eingin minni enn ein veteranur í føroyskum hondbólti, nevniliga vestmenningurin, Ingi Olsen, sum gjørdi fyrsta málið. Hetta fekk hann í dystinum, tá hann við einum góðum skoti sendi bóltin framvið KÍF-málverjanum, Óla Christian Djurhuus, og í málið.

### Rókur í essinum

Næsta dystin vóru mongu áskoðararnir sera spentir uppá. Tá skuldi unga danska talentliðið hjá AaB nevniliga leika ímóti verandi meistarunum úr Kyndli. Dysturin byrjaði við, at AaB spældi skjótt og væl og legði í hvørjum álopi eitt stórt trýst á kyndilsverjuna. Men sum tíðin gekk var týðiligt, at Kyndil ikki vildi geva skarvin yvir. Við einum sera væl leikandi Róki Akralíð á odda eydnaðist Kyndli at enda at vinna dystin tepurt, og hervið høvdu teir vunnið ein sera flottan sigur ímóti einum evnaríkum liði, sum veruliga vildi vísa føroyingum, hvør dugur er í teimum.

### AaB vísti sínar dygdir

Um tað var ferðafepur ella eitt sera vælleikandi kyndilslið er ilt at siga, men eftir ósigurin fyri Kyndli vildu AaB leikararnir veruliga vísa, at tapið ikki var nóg gott. Teir møttu í næsta dystinum vertunum úr KÍF, og í meðan Kyndil hevði vunnið enn ein dyst á síni kós, so vunnu donsku leikararnir sín fyrsta dyst, tá teir hálvavegnu vundu burtur úr kollfirðingum.

Mest eyðsýndi leikarin var uttan iva Michael Ibsen, sum var komin til Føroyar sama dagin, tí hann hevði spælt dyst við ligaliðnum hjá AaB fríggjakvøldið. Hann var bert við í seinna hálvleiki ímóti Kyndli, tí hann júst var komin til landið, men í dystinum ímóti KÍF vísti hann, hvussu góðir leikarar í bestu donsku deildini eru. Hann skeyt eitt skot fyri og annað eftir, og tey fuku um oyruni á bæði verju á málmanni hjá kollfirðingum. Dystin vunnu teir trygt, og nú sá út til, at teir høvdu lagt støðið.

### Kyndil vann kappingina

Meðan Kyndil hevði vunnið báðar sínar dystir, og AaB og Víf ein í part, so var tað ímillum hesi trý liðini, at kappingin skuldi avgerðast. Í síðsta umfarinum møttust AaB og VÍF, meðan Kyndil spældi ímóti KÍF, sum hevði tapt báðar sínar dystir.

Enn einaferð vísti liðið úr Aalborg ótrúliga gott hondbóltsspæl, tá teir vunnu á VÍF. Aftur hesaferð var tað ligaliðsleikarin Michael Ibsen, sum var tann besti leikarin. Men eisini vinstri vongurin, Rasmus Skram, vísti gott hondbóltsspæl, tá hann ferð aftaná ferð snýtti málverjan av vonginum.

So var spurningurin, um kollfirðingar fóru at megna at steðga Kyndli. Í síðsta dystinum leiktu hesi bæði liðini sínámillum, og enn einaferð gjørdist Kyndil vinnari. Hetta hevði við sær, at Kyndil vann allar sínar dystir og sostatt eisini kappingina.

**Leys størv**

sansir.fo

**Strandfaraskip Landsins lýsa við hesum eftir stýrimonnum, hjálparfólki til maskinrúm, dekkara og kokki**

Við hesum verða fýra tíðaravmarkað størv lýst leys hjá Strandfaraskipum Landsins. Søkt verður eftir tveimum stýrimonnum, einum assistenti til maskinrúm og einum dekkara.

Søkt verður eisini eftir einum kokki til fast starv.

Freistin at søkja størvini er tann 5. oktober 2006 kl. 12.00

Sí lýsingina á heimasíðu okkara www.ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS